Leikrit



Jólaleikur

Landsmiðstöðin

Jesu føðing

1. partur

Persónar: **Jósef**
Mattan (lærlingur hjá Jósef)
Eleasar (gamal maður)
Ein kona (móðir Mattan)
Aðrar kvinnur
Yvirhermaður
Undirhermenn

Jósef sagar, ein drongur gongur honum til handa. Eleasar situr og ruggar á einum stabba.

Leiktjald: Aftanfyri sæst partur av býnum Nasaret.

Jósef: Mattan far tú og telg nakrar trænaglar.
Eleasar: Tað er rættiligur dugur í hasum dronginum.
Jósef: (harkar) Ja, hann er bara fittur í hondunum.
Mattan: (Reisist og hyggur) Eru tað ikki hermenn, ið koma eftir vegnum?
Eleasar: Hvat munnu teir vilja her í dag?
Jósef: Eg haldi meg síggja, at tað eru rómverjar. Hvat hava teir nú í kvittanum?

Hermenninir nærkast. Teir rópa og sláa á trummur. Konurnar koma út á gøtuna.

Yvirhermaðurin: (stígur fram) Augustus keisari letur kunngera, at allur heimurin skal skrivast í manntal. Hvør maður eigur saman við húski sínum, at fara til ættarbygd sína at vera skrivaður har.

Hermenninir fara, fólk standa spyrjandi eftir.

Mattan: Hvat merkir hetta, at vit skulu skrivast í manntal.
Ein kona: Og hví skulu vit leita til aðrar bygdir fyri at skrivast á manntalslista. Teir krevja nógv av fólki, hasir rómverjar.
Eleasar: Ja, børn míni. Ikki veit eg um hetta boðar frá illum ella góðum. Jødafólkið hevur í langar tíðir livað í óvissu. Síðani heimkomuna úr Babylon hava vit verið undir ymsum tjóðum: persum, grikkum og nú rómverjum, og rómverskir hermenn reika kring alt landið, so man veit seg ongastaðni tryggan.
Ein kona: Gævi Gud loysti okkum frá hesum oki. - Nær man spádómurin hjá profetunum fara at ganga út?
Eleasar: Eg eri ein gamal maður, men mær leingist so hjartaliga eftir at kunna sæð heimsins frelsara, áðrenn eg doyði.
Jósef: (vendir sær móti Mariu) Maria vit vera noydd at fara til Betlehem at verða skrivað í

manntal, tí hon er mín ættarbygd.

Maria: So mega vit fara, tí kongsins boð skulu líðast.

Ein kona: Mattan vit eru noydd at fara til Betania, tí har er faðir tín ættaður.

Tey fara

2. partur

Ferðin til Betlehem.

Persónar: **Jósef**
Maria
Vertur
ein kona
ein maður

Leiktjald: **Meðan tey ganga, er eitt teppi drigið fyri hurðarnar. Tá tey nærkast Betlehem, verður teppið drigið frá, og partur av býnum kemur til sjóndar.**

Jósef: Nú fer at líða nakað, ert tú móð Maria? (tey ganga)

Maria: Ja, móð eri eg, men eg má royna at klára hetta síðsta strekkið.

Maria: Nú síggi eg ljós.

Jósef: Hatta eru ljósini í Betlehem.

Maria: Tað verður gott at sleppa at hvíla seg, men nú er seint, bara fólk ikki eru løgst.

Tey koma. Teppið verður drigið frá.

Jósef: (bankar á fyrstu dyr og ein maður kemur út) Gott kvøld. Eg ætli at biðja um innivist í nátt.

Maðurin: Tíverri, her eru komin so nógv fólk í dag, at vit fáa ikki hýst fleiri.

Tey biðja góða nátt.

Jósef: (Tey banka á næstu dyr, ein kvinna kemur út) Gott kvøld, orsaka at eg banki á dyrnar so seint. Eg og konan hava ferðast higar í tveir gagar, kundu tygum ikki hýst okkum í nátt?

Kvinnan: Hvussu fegin eg vildi, fái eg ikki hýst tygum. Her liggur fólk allastaðni.

Jósef: Miss ikki mótið góða. Her er eitt gistingarhús.

Jósef bankar á dyrnar. Tað gongur ein løta, áðrenn verturin letur upp.

Jósef: (biður gott kvøld) Kunna tygum ikki hýsa mær og konuni í nátt. Vit hava roynt allastaðni, men ikki fingið innivist. Konan er móð og orkar ikki meira. Bert vit fáa tak yvir høvdið.

Verturin: Her er yvirfylt. Eg fái ikki hýst fleiri. Eg havi eitt fjós, um tit taka til takkar við tí.

Jósef: (vendir sær móti Mariu) Hvat heldur tú Maria?
Maria: Bara eg sleppi inn onkustaðni.

Tey takka, biðja góða nátt og fara.

3. partur

Hirðarnir á markini.

Persónar: **Gabriel**
Einglar
vertur
kona hansara
Esau (yvirseyðamaður)
Esra (ein gamal seyðamaður)
Jónatan (ungur hirði)

Leiktjald: **Hirðarnir sita kring bálið. Esra gongur aftur og fram. Jónatan reisir seg av og á.**

Esau: (sitandi) Hvat bagir tykkum báðum, tit tykjast so óróligir í nátt?
Esra: (steðgar á) Eg veit ikki, alt er so óvanliga friðarligt, sjálvt úlvarnir lata ikki við seg koma.
Jónatan: Hetta er ein løgin nátt, tað hoyrdist ikki eitt kis, bert okkara egnu røddir. Eg fati....
Esau: hyggið at stjørnunum, tær lýsa so bjart sum aldrin áður. Men tit mega royna at sova. Tað er ikki altíð slíkt høvi býðst. Eg kann taka fyrstu vaktina, meðan tit leggja tykkum.
Esra: Eg fái ikki sovið, tað er ikki hugsingur um, tað er sovorðin ófriður á mær, at eg dugi ikki at greiða frá tí. Legg tú teg heldur, so skal eg sita á vakt.
Esau: Sum tú vilt, so leggja vit okkum.

Teir leggjast.

Brádliga skyggir eitt veikt ljós, sum gerst bjartari og bjartari, og seyðamenninir vakna. Teir gerast óttafullir, reisast uppá knæ, fyrst Esau. Eingilin kemur inn.

Gabriel: Óttist ikki seyðamenn. Eg eri komin at bera tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu vera fyri alt fólkið. Í nátt er heimsins frelsari føddur, Jesus Kristus í Dávids stað.

Einglarnir koma inn, syngjandi.

Leitið tí í staðin inn,
gleðin fyllir tykkar sinn
Tit í fjósi skulu finna
faðir, barn og fátæk kvinna
Halleluja, Gud mikil er.

Stjørnir vísa tykkum leið
Harrans orð, tey svíkja ei.
Farið tí við trúgv í sinni,
goymið hans orð í hjarta inn
Halleluja, Gud mikil er.

Ljósið kámast, einglarnir fara.

Jónatan: Hvat var hatta? Sóu tit tað eisini ella droymdi eg?

Esra: (ristir við høvdinum) Hatta var eingin dreymur. Vit sóu og hoyrdu allir einglarnar tala og lovsyngja Gudi.

Esau: Gud hevur sanniliga sent einglar til okkara við boðum frá sær, og tey mega vit lýða.

Estra: Vit mega fara til Betlehem at leita eftir frelsaranum, sum einglarnir røddu um.

Teir fara.
Koma til Betlehem og banka á dyrnar á gistingarhúsinum. verturin letur upp, lykt í hondini: Hvør kemur her mitt á nátt? Vit hava einki rúm eftir. (ilsliga)

Esau: Friður veri við tær og húsi tínum. Orsakað at vit órógva tykkum so síðla. Vit eru als ikki komnir at biðja um innivist. Vit sóknast eftir Jesus barninum.

Esra: Vit hava fingið eina opinbering frá Gudi í hesi nátt. Meðan vit goymdu at seyðafylgjunum úti á Betlehems fløtum, stóðu brádliga ein fjøld av einglum hjá okkum. Teir prísaðu Gudi og søgdu, at heimsins frelsari var føddur her í nátt.

Vertur: Hvør hevur sagt tykkum alt hetta?

Jónatan: Einglar. Vit sóu teir allir samlir.

Vertur: (hánisliga) Tit seyðamenn, tit eru fullir av pátrúgv. Tað er bert okkurt, tit hava droymt.
Bjart ljós - einglar og nýføðingar. Ristir við høvdinum. Farið heldur út aftur á fløturnar og ansið seyðafylgjunum.

Skal lata hurðina aftur, tá konan kemur og svarar til

Konan: Ísak, her er ein nýføðingur. Minnist tú ikki hitt unga parið, sum kom seint í gjárkvøldið. Vit fingu ikki hýst teimum, og tey tóku til takkar við fjósinum. Eg var har úti fyri einari løtu síðani, tí helt eg meg hoyra grát og sanniliga, tey høvdu fingið ein son í nátt. Tey høvdu sveipað hann í klæðir og lagt hann í eina av krubbunum.

Esra: Júst soleiðis segði eingilin frá. Hatta man vera barnið vit sóknast eftir. Lat okkum fara.

Vertur og konan fylgja teimum.

4. partur

Fjósið

Persónar: **Maria**
Jósef
Seyðamenninr
Vísmenninir
kór

Maria og Jósef á pallinum: Barnið liggur í eini krubbu.

Maria: Gud havi lov fyri hettar fjósið. Eg grunaði ikki, at tað fór at vera so tvørligt at fáa innivist.

Jósef: Rætt hevur tú Maria. Meðan vit reikaðu um í nátt, helt eg, at Gud hevði svikið okkum. Eg var um at missa mótið. Tað var so tungt at síggja teg kalda og sjúka, og ongan vita sær, ið kundi hýsa okkum, men Gud man hava sína ætlan við hesum eisini.

Maria: Her í fjósinum føli eg, at Gud er hjá okkum. Sært tú ikki hvussu stjørnurnar glógva, men tað er kalt. Hevði eg bara havt eitt teppi at sveipt um barnið.

Jósef: Vit eru stødd so langt heiman ífrá. Her hava vit ongar kenningar, so tað verður tvørligt at fáa nakra hjálp. Vit mega hjálpast við tí, ið er. Tak kappan hjá mær at balla um barnið.

Maria: (Leggur kappan um barnið) So nú er hann sovaður.

Jósef: Legg tú teg eisini, Maria. Tú treingir til hvíld. Eg skal vakja, um onkur kemur at órógva okkum.

Maria leggur seg.
Einglakórið kemur inn at syngja.
Hirðarnir banka á dyrnar.

Maria: Jósef, hvør er tað sum bankar á dyrnar?

Jósef: (hyggur út) Her eru nakrir seyðamenn. Leita tit eftir nøkrum? Vit eru bert eini fátæk hjún, sum eingin kundi hýsa, og hava vit leitað okkum inn í hetta fjósið.

Seyðamenninir koma inn.

Esau: Meðan vit sótu hjá seyðafylgjunum í nátt, skygdi brádliga eitt bjart ljós, og ein fjøld av einglum stóð hjá okkum.

Esra: Einglarnir lovaðu Gudi og bóðu okkum leita inn í staðin at finna heimsin frelsara, sum var føddur í hesi nátt.

Jónatan: Vit skuldu finna barnið reivað og liggjandi í eini krubbu.

Esau: So eingin ivi er um, at sonur tygara, er barnið, ið einglarnir søgdu frá.

Hirðarnir leggja seg á knæ frammanfyri krubbuna.

Hirðarnir: Lovaður veri Gud í hægsta himli, nú hava vit sæð heimsins frelsara.

Esra. Sum barnið svevur sætt. Tak hettar skinnið at sveipa um barnið, tað lívir betur.
Maria: Takk fyri. Í nátt tykist alt hettar maær so áofatiligt, men eg vil goyma alt, tit hava sagt í hjarta mínum.
Hirðarnir heilsa: Guds friður veri hjá tykkum.

Einglakórið syngur.

Vísmenninir koma, banka á dyrnar.

Maria: Jósef, nú bankar aftur á dyrnar.
Jósef: Hvør kemur her so síðla?
Vísmaður 1. Vit eru tríggir vísmenn, ið hava ferðast heilt úr eysturlondum fyri at finna hin nýfødda kongasonin.
Vísmaður 2. Vit sóu stjørnu hansar har eysturi, og hon hevur víst okkum veg higar. Hon steðgaði beint yvir av hesum fjósi.
Vísmaður 3. Hetta hevur verið ein long ferð, men lovaður veri Gud, at vit umsíðir komu á mál.

Teir leggja seg á knæ frammanfyri vøgguni.

Vísmaður 1. Lítli kongasonur. Tak ímóti hesum gull-luti sum eyðkenni um tína kongaligu tign.
Vísmaður 2. Lítla Guds barn. Eg beri tær roykilsi sum eyðkennir tín guddóm.
Vísmaður 3. Heimsins frelsari. Eg gevi tær myrru sum tekin um alt, tú skalt líða fyri at frelsa okkum menniskju.

Vísmenninir reisast.

Jósef og Maria: Vit takka tykkum so hjartaliga.
Vísmaður 3. Hesar gávur eru lítilsverdar í mun til ta gávu, Gud hevur givið okkum, sín egna kæra son.

Øll koma inn syngja: Gleðilig jól